Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Holm Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Fiskiskapur eftir tunfiski

Spurningar:

1. Hvat er komið burturúr av royndum og vitan í sambandi við royndarfiskiskapin eftir tunfiski í føroyskum øki?

2. Ætlar landsstýrismaðurin at skriva út fleiri royndarloyvi eftir tunfiski í føroyskum sjógvi?

3. Hvat krevst fyri, at Føroyar kunnu fáa limaskap og vera limur í ICCAT, sum er altjóða nevndin fyri umsiting av tunfiski í Atlantshavinum?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at virka fyri at fáa fleiri kanningar og metingar um, hvussu tunfiskur ferðast í føroyskum sjóøki?

Viðmerkingar:

Veiða eftir tunfiski er vanlig um okkara leiðir. Japonsk tunfiskaskip fiska við føroyska markið ein part av árinum, og okkara grannalond veiða somuleiðis tunfisk – eisini nevndur atlantiskur bluefin.

Í Føroyum hevur ávísur áhugi verið fyri tunfiskaveiðu í føroyskum øki. Um aldarskiftið samstarvaðu føroysk feløg við japonsk skip um royndarfiskiskap, tá tunfiskur var í syðsta partinum av føroyskum øki og vestur móti útsynningshorninum í okkara sjóøki. Seinastu árini hevur Fiskimálaráðið aftur fingið umsóknir um fiskiskap eftir tunfiski. Í 2022 vórðu so lutaðar fýra tilsagnir um royndarloyvi til fiskiskap eftir tunfiski í føroyskum øki. Tvær vóru til størri skip, og tvær til bátar í bólki 5.

Føroyar kunnu troyta tilfeingi í føroyskum sjógvi, men tað er millumtjóða felagsskapurin ICCAT, sum umsitur og tekur avgerð um tunfiskastovnin í Atlantshavi. 52 limir eru í ICCAT, men Føroyar hava ikki limaskap. Sum skilst, so er allur handil við tunfiski, ið ikki verður veiddur við heimild í tilráðing frá ICCAT, bannaður í øllum limalondunum. Av tí sama tykist limaskapur í hesum felagsskapinum vera fortreyt fyri vinnuligari veiðu eftir tunfiski.

Fyri at vita, hvat er komið burturúr royndarfiskiskapinum higartil, og hvørjar ætlanir eru frameftir, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 27. oktober 2025

Uni Holm Johannesen